# Upptikið á Hotel Vágum



*Gamla plastvirkið niðan fyri Hotel Vágar skal innrættast við hotelrúmum og ráðstevnuhølum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Á Hotel Vágum hava tey gott mót um komandi árið, sigur stjórin. Í januar hevur nógv fólk búð á hotellinum, og summarið er eisini upptikið**

HOTELVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Á Hotel Vágum eru útlitini fyri árið ikki so galin, sigur Kári Hentze, stjóri. Í januar hevur væl av fólki búð á hotellinum, og summarið tykist fult upptikið longu nú.

Á Hotel Vágum er sum á flestu gistingarhúsum í landinum, sigur Kári Hentze. Har mangla seingjapláss.

Hotellið hevur keypt plastvirkið, sum liggur beint niðan fyri Hotel Vágar, og hevur ætlanir um at innrætta bygningin til eitt sonevnt ráðstevnuhotel. Tað vil siga hotelrúm og stórt ráðstevnuhøli.

Fyrireikingarnar eru í gongd, sigur Kári Hentze, men leggur afturat, at tað verður ikki í ár, at tað arbeiðið verður liðugt.

### Hugnatiltøk

Tey fara at spenna seg út á hotellinum i vár og í summar, sigur Kári Hentze. Ymisk tiltøk verða á skránni í vár, eins og tey í summar fara at skipa fyri fleiri sonevndum Føroyakvøldum á hotellinum.

Kári Henze sigur, at tiltakið við vínsmakking í fjør eydnaðist heilt væl, og skipað verður fyri einum slíkum aftur í vár.

Eisini verða øðrvísi vikuskifti, sum hann nevnir tey, á hotellinum. Skipað verður fyri túrum frá hotellinum, eins og undirhald verður um kvøldið.

Royndirnar í fjør vóru so mikið góðar, sigur hann, at hann ivast ikki í, at royna tað aftur.

Byrjað verður í februar, sigur Kári Hentze, og hildið verður á til út í apríl mánaða við hesum tiltøkunum.

Tá mai mánaði er komin, er sumarið longur komið, og Hotel Vágar fer undir summarskránna.

Í summar verður skipað fyri teimum sonevndui Føroyakvøldunum. Eini sekssjey eru fyribils sett á skránna, sigur Kári Hentze. Tey verða skipað við føroyskum mati og mentan, so sum upplestri og føroyskum dansi.

### Køkurin

Í køkinum á Hotel Vágum er nógv at gera. Bæði til teirra, sum búgva og eta á hotellinum, men eisini tílíkt, sum latið verður út úr húsinum.

Hotel Vágar ger allan matin, sum latin verður umborð á flogførini á flogvøllinum í Vágum, greiðir Kári Hentze frá.

Umframt ger hotellið mat til allar tunnilsarbeiðararnar í Vágum. Og teir eru við tíðini vorðnir bara heilt nógvir, letur hann at. Bæði í samband við undirsjóvartunnilin og Gásadalstunnilin.

Maturin verður vanliga koyrdur á arbeiðsplássið, hóast onkur teirra kemur á hotellið at eta.

Í samband við seinasta skotið í undirsjóvartunlinum varð skipað fyri hátíðarhaldi, har eisini matur frá Hotel Vágum var at fáa.

– Eitt sindur havi eg roynt fyrr, sigur Kári Hentze, men hetta var fyrstu ferð, eg havi verið við til at skipa fyri móttøku mitt inni í einum tunli.

Borðhald varð inni í tunlinum fyri umleið 250 innbodnum gestum, eins og borðreitt eisini varð uttan fyri tunnilsmunnan Vágamegin fyri teimum umleið 200 fólkunum, sum komin vóru at síggja, tá skotið varð.

Seinni um kvøldið var veitsla í Bygdarhúsinum í Miðvági fyri innbodnum. Eisini har stóð Hotel Vágar fyri matgerðini.

Matstovan á Hotel Vágum verður alt meira vitjað, sigur Kári Hentze. Serliga er tað um vikuskiftini, at fólk støkka inn á gólvið at fáa sær ein betri bita, sigur hann.



*Hotel Vágar stóð fyri borðhaldinum, tá seinasta skotið í undirsjóvartunlinum varð latið av*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vetrartilboð frá Maersk Air

**Kappingin um ferðafólkini millum Føroya og Danmark stendur við. Maersk Air bjóðar nú aftur bíligar ferðaseðlar**

FLOGFERÐSLA

Maersk Air bjóðar ferðaseðlar upp á tilboð til fram móti páskum. Tilboðini eru galdandi á rutunum millum Vágar og Kastrup og Vágar og Billund.

Í tíðindaskrivi sigur Maersk Air, at bíligu ferðaseðlarnir verða seldir í tíðarskeiðnum frá 30. januar til 16. mars, meðan tíðin, ferðast kann, er fram til 25. mars, sum er mánadagur í páskaviku.

Ferðaseðlaprísurin millum Vágar og Kastrup er kr. 1.860,- við øllum avgjøldum, meðan prísurin millum Vágar og Billund er kr. 1.498,-.

Børn í aldrinum tvey til ellivu ár fáa 50 prosent í avslátti, meðan pinkubørn undir tvey á ferðast fyri kr. 150,-.

Tað verða ávísar treytir lagdar á hesi tilboðini. Til dømis skulu ferðirnar í mesta lagi vara í fýra dagar, eins og tann, ið ferðast, skal vera burtur náttina millum leygardag og sunnudag.

Frágaringardagar úr Føroyum eru hósdag, fríggjadag ella leygardag, meðan heim aftur verður komið sunnudag ella mánadag.

Ferðaseðilin skal keypast í seinasta lagi eina viku áðrenn fráferð og kann ikki broytast ella endurrindast.

Tá ferðast verður við hesum bíligu ferðaseðlunum, skulu í minsta lagi ein vaksin og eitt barn vera í ferðalagi, sigur Maersk Air í tíðindaskrivinum.

**ej**



*Maersk Air kappast um ferðafólkini úr Føroyum við bíligum ferðaseðlum fram móti páskum*
*Mynd: Edvard Joensen*



Privatiseringar í Løgtinginum:

# Lítið ítøkiligt orðaskifti



*Framsøgumaðurin hjá Fólkaflokkinum, Finnbogi Arge, dámdi væl tankan um privatiserin av fyritøkum landsins. Hann helt m.a., at hetta fór at geva vinnuni betri karmar at virka undir*
*mynd: Jens Kristian Vang.*

**Tingmenn høvdu ikki nógv nýtt at siga, tá løgtingið hevði aðalorðaskifti um privatiseringar**

Týsdagin hevði tingið aðalorðaskifti allan dagin um privatiseringar.

Fleiri tingmenn tó orðið, men orðaskifti var merkt av at vera lítið ítøkiligt.

Løgmaður hevði frammanundan orðaskifti givið tingmonnum eina frágreiðing, sum var grundað eina aðra frágreiðing – nevniliga frágreiðing um at einskilja fyritøkur landsins.

Fleiri tingmenn nýttu eisini høvi til at viðmerkja, at val er í hondum, og hetta nokk hevði okkurt við sakina at gera, tá ið uppskotið kemur fyri nú.

Løgmaður avvísti hesum, og hann sóknaðist eisini eftir, at flokkarnir vístu stevnu í spurninginum um privatiseringar,

Serliga Fólkaflokkurin vísti seg at hava góðan hug á privatiseringum. Andstøðuflokkar vóru allir sum ein avvísandi yvirfyri ætlanum hjá landsstýrinum. Framsøgumaðurin, Finnbogi Arge, var heitur fortalari fyri, at landsins fyritøkur fara á privatar hendur.

Jenis av Rana úr Miðflokkinum helt, at talan var um ein sjónleik ella eina parodi, tí val verður í næstum. Hann kendi tey eisini sum um, at samgonganm hevði lyndi til at gloyma kreppuárini.



*Tær báðar, Jóna og Birita, sum eru í starvsvenjing á Sosialinum, vóru ein túr í Løgtinginum til orðaskifti um privatiseringar. Tær báðar ganga í Kommunuskúlanum í Havn. Maðurin í miðjuni er av Viðareiði*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Javnaðarflokkurin vísti sum áður á stórar vansar við at privatisera. Serliga Føroya Banki lá í buktini har. Sum heild vóru eisini nógvir tingmenn, sum ikki sóu nakað kløgt í at lata Føroya Banka á privatar hendur.

Tingmenn megnaðu heldur ikki at halda seg til evnið, og gamalt partapolitiskt stríð vísti seg javnan, tá tingmenn vitjaðu røðarapallin.

Orðaskiftið staðfesti, at samgongan stendur rættiliga langt frá andstøðuni.

Lagnan hjá ætlaðu privatiseringunum er enn óviss.

# Anders Fogh Rasmussen leggur leiðina til Grønlands

**Anders Fogh Rasmussen leggur nú leiðina til Grønlands. Áleikandi evni verða tikin upp á tveir dagar longu arbeiðsvitjanini**

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, er eftir øllum at døma vorðin so mikið glaður fyri at ferðast til ríkesfelagar sínar, at hann nú fer á stutta vitjan í Grønlandi.

Anders Fogh fer til Grønlands mikudagin, og steðgurin verður tveir dagar.

15. januar eftir eina stutta, men ógvuliga væl eydnaða vitjan í Føroyum, allir politisku flokkarnir kendu vitjanina og útsagnirnar hjá danska forsætisráðharranum sum stórsigar.

Anders Fogh hevur eftir øllum at døma heldur ikki gloymt føroyavitjanina.

– Jeg lægger vægt på hurtigt at få førstehåndskendskab til, hvad der rører sig inden for rigsfællesskabet. I samme anledning besøgte jeg Færøerne for et par uger siden, sigur Anders Fogh Rasmussen undan fráferðini til Grønlands.

Áleikandi evni eru á skránni teir báðar dagarnar, ið forsætisráðharrin er í Grønlandi.



*Grønlendingar fáa nú vitjan av danska forsætisráðharranum, sum fyri stuttum vitjaði í Føroyum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jeg ser frem til at høre nærmere om de grønlandske synspunkter. Samt om, hvordan det generelt går i Grønland. Og lytter gerne til, hvilke tanker man gør sig i Grønland om fremtiden.

På udenrigsområdet vil vi drøfte forholdet til USA og til EU. Det sidste også i lyset af det danske formandskab i 2. halvår 2000, sigur altso Anders Fogh Rasmussen.

# Rás Tórshavn fyri kollveltandi broytingum

**Tað er nógv, sum røkist fyri, at Rás Tórshavn í framtíðini fer at gerast heilt øðrvísi. Fólk fara í framtíðini at kunna taka ímóti talgildum sjónvarpsrásum, umframt at fleiri aðrar tænastur sum alnetsamband liggja fyri framman.**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Føroya Tele arbeiðir í løtuni saman við Tórshavnar Býráð við einari ætlan, sum skal broyta munandi upp á Rás Tórshavn.

Tey seinastu tíggju árini, ið borgarar í Tórshavnar Kommunu hava havt Rás Tórshavn, hevur møguleiki verið fyri at síggja útlendskar sjónvarpsrásir um fylgissvein. Rok hevur til tíðir verið um hesar góðu rásir. Sum støðan er nú, skal rásin TV3 takast av skíggjanum hjá havnarfólki í vikuni, men røkist fyri einari loysn.

– Sum støðan er nú, verður sløkt fyri TV3 1. februar, men samráðingar eru og havi eisini verið millum partarnar í longri tíð. Vit hava tó í samráð við Føroya Tele hugt at øðrum møguleikum í sambandi við Rás Tórshavn, har talan verður um, at Føroya Tele skal yvirtaka Rás Tórshavn, og rásirnir gerast talgildar og fleiri, sigur Jan Christiansen.



*– Vit kunnu fáa eitt analog signal til at gerast til fimm digital, soleiðis at tær fimm rásirnar kunnu gerast til nógv fleiri, men hetta noyðist ikki at vera sjónvarpsrásir, sigur Andras Róin*

Býráðsfundur verður í kvøld, hóskvøldið, har Rás Tórshavn verður ovast á dagsskránni.

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, váttar fyri Sosialinum, at tær í løtuni eru í samráðingum við Tórshavnar Kommuna, um framtíðarlagnuna hjá Rás Tórshavn. Í løtuni er tað Føroya Tele, ið umsitur Rás Tórshavn fyri Tórshavnar Kommuna, og hetta ger eisini, at Føroya Tele, sambært Andras Róin, hevur upparbeitt sær servitan á økinum.

– Vit gera í løtuni eitt kanningararbeið, sum er rættiliga umfatandi. Tankin er, at vit skulu yvirtaka Rás Tórshavn, men hetta verður ikki bert gjørt fyri at geva borgarunum eina ókeypist tænastu, tí Føroya Tele má skapa eitt yvirskot á øllum økjum, sigur Andras Róin.

Stjórin á Føroya sigur, at broytingarnar hjá Rás Tórshavn skulu eisini síggjast í tí ljósinum, at tekniskar umleggingar skulu til í sambandi við, at lagt verður um á flestu rásum frá analog til digitalt ella talgilt, sum tað eitur á føroyskum.

– Ætlanin er, at fólk skulu kunna móttaka signalið við verandi anntennu útbúnað. Talan verður so um, at ein talgildur móttakari skal setast til við einum korti, sum sostatt kann móttaka signalið og gera, at tað kann síggjast í sjónvarpstólinum, sigur Andras Róin.

Hann váttar, at teir hyggja eftir møguleikan, sum eisini innibera annað enn bert eina nýggja sjónvarpsrás.

– Vit kunnu fáa eitt analog signal til at gerast til fimm digital, soleiðis at tær fimm rásirnar kunnu gerast til nógv fleiri, men hetta noyðist ikki at vera sjónvarpsrásir, sigur Andras Róin.

Møguleikan um internetsamband við eitt tílíkt kerv verður eisini kannaður, men einki ítøkiligt er enn avgreitt.

Uttanlands er marknaðurin fyri slíkum móttakarum vorðin stórur, og møguleikarnir eru eisini rættiliga umfatandi. Andras Róin sigur tað vera eitt sera spennandi øki, sum kann lata upp fyri nógvum møguleikum.

Jan Christiansen, býráðsformaður, veit at siga, at ókeypis rásir til borgararnar sum hjá Rás Tórshavn er eindømi, og tað er spurningurin, hvussu leingi henda skipan fer at vera møgulig í framtíðini.